# Munur á DR og Kringvarpi Føroya

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



Eingin avvarðandi tekur ábyrgd. Í Kringvarpsnevndini er tøgn,

Kringsvarpsstjórin veit, at best er at tiga. Tíðindaleiðarin biðjur fólk bara um at kæra. Landsstýrismaðurin í mentamálum torir ikki at nerta tvungna borgaragoldna stovnin.

Tað er ikki sjáldan ónøgdin sæst hjá Føroyafólki um misvísandi tíðindi í Kringvarpi Føroya, uttan nakra umbering, hóast átalur.

Hinvegin kemur ofta fyri í Danmarks Radio, at tíðindaberin kemur antin fram á skýggjan ella í útvarpinum og sigur “Vi har en rettelse....”!

Fyri fáum døgum síðani fekk dugnaligi tíðindamaðurin hjá donsku TV-avisen, Jeppe Nybroe, av at vita frá ymiskum síðum, frá fjølmiðlafólki, professarum, fólki ið viðgerð pressuetikk og tíðindaleiðaranum Ulrik Haagerup sjálvum, sum m. a. sigur, at “hetta er sera álvarsamt mál”.

## Umbering ikki nóg mikið

Hvat hevði so hesin fjølmiðlasyndarin sagt og gjørt?

Jú í frásøgn um sjónvarpsupptøku, segði hann, meðan hann vísti “rullandi” myndir, at hetta er ein konvoj av donskum hermonnum sum “fara út úr Irak”, meðan myndin vísti eina konvoj á veg úr Kuwait inn í Irak.

Stjóri hansara í DR gjørdi stutta prosess og segði, hetta verður einasta og seinasta ávaring og umframt, sleppur hann ikki aftur á skýggjan komandi tríggjar mánaðirnar.

Hesin nipni tíðindamaðurin hevur í fleiri førum biðið um umbering fyri, tað hann kallar: “Jeg erkender, beklager og er ked af, at have begået en fejl”. – Tíðindini vórðu beinanvegin tikin av skerminum.

Men so lætt sleppur hann ikki. Fjølmiðlaløgfrøðingurin Oluf Jørgensen frá Danmarks Journalisthøjskole sigur m.a. og vísir á, at hetta vóru ikki bert skeiv tíðindi, men:

“Det svækker DR’s troværdighed, for det er en bevidst vildledning, der er sket”.

## Tørvandi trúvirði

Eg havi hópin av landsmonnum við mær, tá eg sigi, at ein upprudding í tílíkum máli, hevði ikki komið fyri í Kringvarpi Føroya. Mangur hevur í føroyskum bløðum, uttan iva av røttum, givið ilt av sær um kringvarpsstovnin. Tey flestu bara geva frið. Ein politikari klárar seg altíð, annars skal hann halda seg burtur uttanfyri politikk. Men eg hugsi um føroyingin sum heild.

Eitt av mongum dømum er, tá vit fyri stuttum sóu í Sjónvarpi Føroya ein arbeiðsgevara, sum hevði fingið arbeiði í Kommunuskúlanum í Havn, verða avsmurdan, tí hann var í ætt við onkran, sum arbeiddi hjá Tórshavnar Kommunu og spurningurin var um útbjóðingina. Eisini varð borgarstjórin drigin á tráð. Eg havi skilt, at kæra er send fjølmiðlanevndini. Spennandi at síggja úrskurðin. Men hesin verður so noyddur heldur enn at arbeiða fyri at vinna pening, nú at gera eitt størri pappírsarbeiði. Hetta kann Kringvarpið gjalda seg frá og krevja peningin frá lurtaranum.

Spurningurin er, um vit bara síggja tind á ísfjallinum. Eingin ivi er í, at fleiri hava liðið undir veikum leiðarum á kringvarpsliðinum, uttan eg kann prógva tað.

## Ongar avleiðingar

Sjálvur havi eg fyri stuttum verið inni á tíðindaflutningi frá bæði Sjónvarpi- og Útvarpi Føroya, sum eg avgjørt meti at vera álvarsliga misvísandi. Eg komi at venda aftur til hetta, helst við einum fyrispurningi til Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann.

Ja, munur er á DR og Kringvarpi Føroya, og sannleikin er tíverri, at eingin avvarðandi tekur ábyrgd. Í Kringvarpsnevndini er tøgn, Kringsvarpsstjórin veit, at best er at tiga. Tíðindaleiðarin biðjur fólk bara um at kæra. Landsstýrismaðurin í mentamálum torir ikki at nerta borgaragoldna stovnin.

- Tilber at lesa aðrar greinar um sama mál á www.keldu.com

# Málrøktarar?

**Í Dimmalætting hin 3. august er áhugaverd samrøða við Svenning Tausen lærara um móðurmálið. Tað hitar altíð hjartað og tú og fegnast um, at vit enn eiga menn, sum vilja móðurmálinum væl**

JOHN S. MYLLHAMAR



Tí er spell og kennist tað ikki sørt hugstoytt, at tað finnast fólk, sum breiða út haldleysar skuldsetingar móti teimum, sum royna at eggja fólki til at fara væl um málið. Eg haldi ikki, at hesir hava uppiborið slíkt heiti so sum málpávar, puristar o.tl, tá ið hugsað verður um alt arbeiðið, ið komið er frá hond teirra. Tað er ikki ov nógv sagt, at Jóhan H. W. Poulsen saman við øðrum góðum fólki hevur savnað og skrivað týdningarmesta bókaverk, sum nakrantíð er givið út í Føroyum - Móðurmálsorðabókina. Slíkt er ikki nakað. tú setir teg niður við borðið og setur saman í nakrar dagar. Tað gerst ikki upp í tímum, hvussu nógv tíð og orka er løgd í hetta mikla mentannarverk.

Nú bókin er teldutøk, er lætt at sláa upp í henni hjá tí, ið fæst við at skriva. Úrvalið av orðum er ovurhonds, orð, sum eru snøgg og liggja væl á tunguni, umframt at neyv kunning verður givin um bendingar, føll og annað. Tí skuldi verið lætt hjá blað- og fjølmiðlafólki og øðrum, sum fáast við at skriva at gjørt sær ómak at kaga í hana, so at málburðurin gerst betri enn hann ofta er.

Ikki minst átti teldutøka bókin at komið lærarum og næmingum væl við. Tí ljóðar tað øvut, at hesir atfinnarar geva sær sjálvum heitið málrøktarar, tí orðið røkta merkir sum kunnugt at taka sær væl av, hjúkla um, ansa - og ikki minst røkja. Eg ivist ikki í, at somu menn hava tikið til sín mong av nýggju orðunum og nøvnunum, sum gjørd eru. Neyvan vilja teir venda aftur til tey útlendsku. Hvussu mong munnu í dag nevna farteldu sína berbarur computari?

Hann má vera framasøkin, ið fær undirlutakenslur av at lata seg rættleiða av øðrum. Eins og tað er sjálvfylgja at læra næmingar at rokna rætt, skuldi tað verið sjálvfylgja at lært næmingin at skriva og tosa rætt. Man nakar næmingur kenna seg happaðan, tí lærarin roynir gera hann dugnaligan í støddfrøði, lívfrøði, alisfrøði o.ø.? Sama má vera galdandi, tá ið talan er um at læra næmingin málfrøði, at skriva og tosa rætt.

# Aftursvar til Poul Mohr

ANFINN KALLSBERG



Tað er púra misfatað, at okkara umboðan í útheiminum er donsk.

Allir sendimenn og sendifulltrúðar eru settir av Føroya Landsstýri, og teirra løn og aðrar útreiðslur verða goldin av føroyskum skattgjaldarum yvir føroysku fíggjarlógina. Teirra arbeiðsgevari er Uttanlandsdeildin í Tinganesi, har Føroya Løgmaður hveur politisku avgerðina og ábyrgdina.

*Við hávirðing*
Anfinn Kallsberg

# Strandferðslan avsannar beinspenning

**Stjórin í Strandferðsluni heldur ikki, at stovnurin hevur sett fyriskiparunum av ovastevnuni órímilig krøv**

OVASTEVNA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

“Strandfaraskip Landsins hevur á hvørjum ári lagt nógva orku í fyri at fáa eina so góða loysn, sum til ber í sambandi við ovastevnu.”

Hetta stendur millum annað í einum skrivi frá Strandfaraskipum Landsins, sum er sent fjølmiðlum í sambandi við ein grein, sum stóð her í blaðnum í gjár. Í greinini var ein samrøða við Jákup av Skarði, fyriskipara av ovastevnu, ið fýltist á vánaligu treytirnar, sum nólsoyingar fáa frá Strandfaraskipum Landsins.

Hesum vil stjórin í Strandfaraskipum Landsins, Regin Vágadal, ikki hava sitandi á sær, hóast hann í skrivinum váttar, at nólsoyingar mugu rinda 15.000 krónur fyri leigan av skipi allan vegin úr Klaksvík, umframt gjaldið á 20.000 krónur og hækkaðu ferðaseðlaprísirnar umborð á Rituni, sum fer at kosta hvørjum festivalgesti ein hundraðkrónuseðil.

Í skrivinum frá Strandfaraskipum Landsins verður viðmerkt, “...at um veðurlíkindi ikki verða til vildar, sum allarhelst hevði viðført fá fólk (sum vit sjálvandi ikki vóna!), so viðførir hetta eitt fíggjarligt tap fyri SL”.

# Søga og ferðavinna knýtt saman

TÍÐINDASKRIV

Sum kunnugt er Gøtubygd gomul niðursetubygd heilt aftur til landnámstíðina.
Í kjalarvørrinum á tí áhugaverda útgrevstrinum í Syðrugøtu í vár og í summar har fornleivdir eru funnar, sum í fleiri førum stava frá víkingatíðini, hevur ein áhugabólkur tikið stig til at stovna eitt felag í Syðrugøtu fyri at menna søguna og ferðavinnuna á staðnum. Umhvørvið á hesum staði er ein søgu- og náttúruperla og hevur innan hesi øki ymiskt at bjóða - bæði ferðafólki og heimafólki.

Stovnandi aðalfundur nýggja felagsins verður á Café Tøting á Tøtingarvirkingum í Syðrugøtu mikukvøldið 22. august kl. 19:30. Símun Arge, fornfrøðingur, kemur at greiða frá ymiskum útgrevstrum og fornleivdum í Syðrugøtu.
Eitt av endamálum felagsins er at menna søguna og søgutengda ferðavinnu í umhvørvinum, s.s. søguslóðir sum vit eisini kenna aðrastaðni í Føroyum. Stigtakararnir vóna, at mong nýta høvi at møta til tiltakið.



*Gøtubygd er gomul niðursetubygd heilt aftur til landnámstíðina*